# Barn, sum mistrívist

Mistrivnaður í skúla/skúlanoktan.
Illgruni um ADHD ella autismu.
Skúli/foreldur kontakta Sernám.

**sernám**

Samrøða við lærarar.

Samrøða við foreldur.

Kanning í skúlanum.

Kognitiv kanning av barninum.

Tilmæli um námsfrøðilig átøk/saman við Gigni.

Kontakta barnaverndina um stuðul í heiminum.

Er hetta ikki nøktandi + illgruni um psykiatriska líðing: Ávísa til barna- og ungdómspsykiatriina.

---

Er talan um mistrivna, atferðartrupulleikar, ovbyrjan, trauma, trupulleikar í familjuni og tørvi á stuðli. Øll hava skyldu at boða frá, tá ið tey síggja eitt barn, sum er fyri umsorganarsvíki ella ágangi.

**Barnaverndarstova Føroya**

**GIGNI**

Samrøða við foreldur og barnið.

Meting av heiminum/foreldraførleika.

Familjuviðgerð ella stuðul í heimið. Traumaviðgerð, handfaring av umsorganarsviki, supervisión til fosturforeldur og barnaheim.

Familjuráðgeving, familjuterapi, skipað evidensbaseraði átøk, t.d. PMTO – les nærri her:
**https://socialstyrelsen.dk/tvaergaende-omrader/Udviklings-og-Investeringsprogrammerne/dokumenterede-metoder-born-og-unge**

Stuðul í heiminum, alt eftir tørvi.

Er illgruni um menningarórógv (autisma/ADHD) verður ávíst til Sernám.

Er illgruni um psykiatriska líðing/menningarórógv skal ávísast til barna-og ungdómspsykiatriina. Kanning/lýsing av barninum og av foreldraevnunum verða send við.

---

Er illgruni um psykiatriska líðing, t.d. angist, tunglyndi, psykosu, etingarólag o.a.

**KOMMUNULÆKNI**

Samrøða við familjuna og barn við áherðslu á tað kliniska.

Meting av somatisku heilsustøðuni við blóðroyndum o.ø.

Fráboðan til barnavernd, um tørvur er á stuðli í heiminum og umlætting.

Ávísing til privatstarvandi sálarfrøðing til viðgerð av lættari tunglyndi og angist.

Er illgruni um menningarórógv (autisma/ADHD) verður ávíst til Sernám.

Er illgruni um psykiatriska sjúku skal ávísast til barna- og ungdómspsykiatriina.

## Barna- og ungdómspsykiatriin á Landssjúkrahúsinum

Útgreining og viðgerð av í høvuðsheitum:

Psykiatriskum sjúkum: Tunglyndi, angist og OCD (tvingsilstankar og -gerðir), sum eru torgreiddar.

Menningarórógv: ADHD/ADD + autismubrá.

Etingarólag.

Psykotiskar sjúkur.

Persónligheitsórógv.

### MMR/Sernám/skúli

Fáa útgreiningarúrslit. Sernám brúkar úgreiningina og tær sálarfrøðiligu kanningarnar til at hjálpa skúlanum við at seta í verk hóskandi sernámsfrøði í undirvísingina og undirisingarrammurnar.

Møgulig ávísing til serflokkar og veita viðkomandi stuðul til barnið.

Undirvísa og ráðgeva lærarum fyri at menna teirra førleikar.

Serlig skipað útbúgving.

### Kommunur/barnavernd

Halda fram við viðkomandi arbeiði við familjuni, umlætting, stuðli.

Møguliga stuðulspersón til barnið.

Traumatiseraði børn og ung fáa viðkomandi stuðul og viðgerð fyri umsorganarsvik.

Supervisión til fosturforeldur og barnaheim.

### AMR/Almannaverkið

Ráðgeva familjuni um møguligar stuðulsfyriskipanir.

Tann góða tilgongdin: Ráðgeving til familjur við børnum við autismu/ADHD.

Hjálparráð.

Mentor/stuðulspersónur.

Stuðul í sambandi við útbúgving og arbeiðsroyndir.

Bústað.

### Kommunulæknar

Taka yvir viðgerðina hjá børnum og ungum, sum eru í støðugari og minni torgreiddari heilivágsviðgerð fyri ADHD og svøvn (kontrol hálva hvørt ár). Fáa epikrisu við viðkomandi vegleiðing um uppfylging.

Taka yvir viðgerðina hjá børnum og ungum, sum eru komin fyri seg eftir t.d. tunglyndi, men sum framvegis fáa heilivág eitt tíðarskeið. Fáa epikrisu við vegleiðing um, hvussu heilivágsviðgerðin stigvíst kann minkast niður í einki.

Møguleika fyri ráðførslu við barna- og ungdómspsykiatriina eftir tørvi.

**Góðu samstarvsfelagar, serliga Jenis av Rana, landsstýrismaður í undirvísingarmálum, Elsebeth Mercedes Gunnleygsdóttir, landsstýriskvinna í almannamálum, Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum og Heðin Mortensen, formaður í Kommufelagnum.**

Vit hanga saman – vit eru ein skipan – og vit mugu samstarva fyri at eydnast við at hjálpa børnum og ungum, ið mistrívast. Vit vilja øll gera okkara arbeiði til lýtar, vit hava stór hjørtu og góðan vilja. Men vit koma bert á mál saman, og vit mugu fáa skipanina at rigga. Annað kunnu vit ikki loyva okkum, tá ið tað eru so mong, sum tørva okkara hjálp.

Í løtuni eru fløskuhálsar og proppar í skipanini okkara millum. Vit stúva saman ymsastaðni. Hjá okkum er bíðitíðin ALT ov long, og orsøkirnar eru nógvar. Ein orsøk er, at tað verða nógv fleiri – og nógv yngri – børn ávíst enn áður, m.a. tí illgruni eru um ADHD. Vit fáa ávísingar við børnum, sum hava verið fyri ógvusligum trauma í heiminum, tilburðir, ið eingin hevur varnast, steðgað og handfarið. Tí eiga kanningar at verða gjørdar og átøk gjørd í heiminum, áðrenn børnini verða ávíst tvið illgruna um psykiatriska líðing. Sjúkueyðkenni so sum trupuleikar at hugsavna seg og at halda viðvarandi uppmerksemi, kunnu – eitt sindur sum sjúkueyðkenni fepur – hava fleiri ymiskar orsøkir. Umframt ADHD, so kunnu hesi eisini vera tekin uppá m.a. trauma, sálarlig ovbyrjan, ov høg krøv í gerandisdegnum til dømis.

Skiljið okkum rætt. Vit er fegin um at síggja børnini tíðliga og vita, at tiltøk í tøkum tíma eru av størsta týdningi bæði fyri møguleikan at koma seg hjá tí einstaka og fyri samfelagsbúskapin. Tí hava vit brúk fyri, at tit hjálpa familjunum (og okkum) við at síggja og hjálpa børnunum, sum "bert" eru kognitivt óbúgvin og teimum, sum ikki trívast í teimum heimum, ið ikki virka nóg væl.

Hesi børnini og hesi ungu reagera sum vera man, tí lívið er trupult. Tað er í síðsta enda tit úti í skúlunum og á Sernám, sum skulu brúka tey data, sum tit fáa við at eygleiða, við samrøðum og við kognitivum kanningum, fyri best at megna at skilja og stuðla barninum. Tað eru tit í Gigni og í barnaverndartænastnum, sum arbeiða í heiminum, sum skulu stuðla familjunum og foreldrunum í at skapa góðar og tryggar karmar.

Soleiðis hava vit brúk fyri hvørjum øðrum allan vegin ígjøgnum. Áðrenn, meðan og eftir útgreiningina, umframt eisini tá ein møgulig viðgerð er í gongd. Ímyndið tykkum, um vit í barna- og ungdómspsykiatriini í morgin við einum gandasveipi høvdu útgreinað tey umleið 200 børnini og ungu, sum standa á bíðilista. Hvør skuldi lofta teimum og gjørt tey neyðugu átøkini í skúlunum og í heimunum aftaná?

Vit hava Almannaverkið, sum so við og við hava fingið til vega nógv góð tilboð til familjurnar og børnini – sum hjálpa familjunum aftaná útgreining. Sum er tekur barna- og ungdómspsykiatriin lut í parti av viðgerðini, men skilabest hevði verið, um vit høvdu ressursur at gjørt meira og havt eitt størri útboð av viðgerðartilboðum. Harumframt er eisini tørvur á stuðli, so børnini kunnu trívast og mennast í skúlanum og í heiminum.

Føroyar er eitt lítið land, men vit hava nógvar geirar og er tí nakað sundurbýtt. Vit hava roynt at tosa við nøkur av teimum, sum fyrisita viðkomandi lógir, men tey geva tekin um, at tey hava uppgivið, tá ið tað kemur til at broyta hetta. So vit mugu fyribils læra at navigera í teimum skipanum, sum eru til taks og sum vit sjálvi hava bygt upp.

Í barna' og ungdómspsykiatriini hava vit arbeitt miðvíst við at víðka tilboðini og virkisføri í tilboðunum. Tey seinastu sjey árini, síðani vit fingu sett ein serlækna í fast starv, eru vit farin úr 8 í 21 starvsfólk. Vit hava m.a. ment fleiri nýggj viðgerðartilboð, fingið nýggjan serkunnleika heim, spesialiserað okkum meira og sett nýggjar deildir á stovn.

Um sama menning og uppstigan ikki fer fram í øllum geirum og hjá øllum myndugleikum, so eru familjurnar líka vítt sum sítt. Vit eiga at avstemma væntaninar til samstarvið okkara millum. Í myndini omanfyri hava vit í myndini lýst tað, vit yvirskipað halda, at familjurnar, børnini og tey ungu kunnu vænta av okkum – og vit eru heilt og fult greið yvir, at tit kanska ikki eru heilt samd við okkum.

Tí senda vit hendan boðskapin serliga til landsstýrisfólkini, og stjórnarráð teirra, sum fyrisita tey avvarðandi økini: Soleiðis halda vit, at tað eigur at síggja út, um vit skulu loyva okkum at kalla okkum eitt vælferðarsamfelag, tá ið tað snýr seg um børn og ung við serligum tørvi.

Vit vænta av okkum sjálvum, at vit kunnu kanna og viðgera børn og ung við psykiatriskum sjúkum og menningarórógvi. Tað ganga vit útfrá, at tit eisini vænta av okkum. Vit vænta, at vit kunnu samstarva tvørfakliga og at fakliga støðið er ein treyt fyri einum góðum tvørgeiraligum samstarvi.

Harumframt hava vit valt at blanda okkum í kjakið við tí endamáli at seta sjóneykuna á tann stóra tørvin á betri tilboðum og betri viðgerð til børnini og tey ungu í øllum teimum skipanum, sum tey eru partur av.

Lat okkum frætta aftur.

Vinaliga

**Rebekka Gudmundsson Perlick**
Yvirlækni í barna- og ungdómspsykiatriini

**Rannvá Vang**
Yvirlækni í barna- og ungdómspsykiatriini

**Súsanna Reinert-Petersen**
Yvirlækni við sergreinaábyrgd í barna- og ungdómspsykiatriini

**Camilla Henanger**
Sálarfrøðingur og leiðari í barna- og ungdómspsykiatriini